LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister´s Office

Løgtingið

Svar
uppá

skrivligan fyrispurning nr. 52-040/2022 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Hervør Pálsdóttir, løgtingsmanni, um um navnalógina og formlig boð til fólkakirkjuna

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Metir løgmaður tað verða virðiligt, at landsstýrismaðurin í mentamálum drálar við at geva fólkakirkjuni formlig boð um, at prestar skulu kunna skráseta børn hjá sammøðrum, soleiðis sum tulkingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum staðfestir?

2. Ætlar løgmaður, sum hevur eftirlit við landsstýrisfólkunum, at fara inn í málið, soleiðis at børn hjá sammøðrum kunnu skrásetast, soleiðis sum tulkingin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum staðfestir?

Svar:

Til spurning 1 og 2
Mál sum eru tvørgangandi millum tvey ymisk stjórnarráð taka altíð sína tíð at avgreiða endaliga. Í løtuni verður umhugsað málsøkisflyting, har tað verður meira eintýtt, hvussu kirkjubókaføring skal skipast í mun til navnalóggávumyndugleikan.

Í Tinganesi, 5. oktober 2022

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður